# Vit elska kjerligheit

Hóast summarið er farið at halla, og hugurin til hugna, hekkling og heitt kakao aftur er í hæddini, skulu vit ikki gloyma at minnast at hjúkla um hvønn annan.

**Lagt til rættis:** Rigmor Dam

Tað er so nógv lættari at vera forelskað um summarið, tá ið blómurnar spretta, kjólarnir leiftra og amorinurnar flákra í luftini.

Veruligur og inniligur kærleiki er framhaldandi heitur, tá ið summarið er av, og hann heldur hitanum bæði heyst og vetur.

Romantikkur er ikki bara nakað mann lesur um í bløðunum, hann er eisini her hjá okkum. Men hjørtu, blómur og sjokolátu hava vit líkasum sæð fyrr – hjarta er so amerikanskt, blómur eru tekin um ringa samvitsku, og sjokolátan verður handað víðari til onkra vinkonu, sum er alt ov kløn.

Tí verður tú hervið boðin inn í ein heim av øðrvísi romantiskum listum, sum bæði eru herligari og kjerligari, tá ið tað snýr seg um at halda lív í kærleikanum, ella fáa lív í aftur kærleikan í parlagnum.





- Majoneshjarta í matpakkan
- Eina góða bók við til skips – við einum lítlum lepa í
- Ein muss á ein serviett í matpakkan
- At seta myndir í album saman
- At lesa søgur fyri hvørjum øðrum
- At skypast í arbeiðstíðini
- Skiftið um kodda!
- Læra eitt fremmandamál á kvøldskúla saman
- Skulka og liggja í songini saman allan dagin
- Lat teg í troyggju hansara og njót angan av honum
- At fara á seiðaberg saman
- At liggja í tjaldi við Leynavatn
- At hoyggja saman
- Lumpa eina karamellu í jakkalumman
- Koyra túr við prutlinum
- At príggja í eini kavafonn
- At eta høsnarunga við fingrunum saman, meðan tit hyggja inn í eyguni á hvørjum øðrum alla tíðina – kann vera bæði stuttligt og frekt!!





...Og um hann ikki er serliga romantiskur:

- Legg ein parfumuprøva í jakkalumman hansara
- Skriva "eina reyða rósu" á innkeypslistan, tá ið tú sendir hann í býin

...Ein neyðloysn, um hann heldur ikki skilur skemt

